

HEPPIN

*– Eg var heppin at møta júst Harry. Hann er ein góður og fittur maður, sigur Sammy. Her við Gjógv blómar kærleikin teirra millum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hóast hon var komin væl fyri, gloymdi hon ikki familju sína.

– Eg sendi allar pengarnar, sum eg forvann sum húshjálp heim til familju mína.

– Á henda hátt kundu tey yngru systkin míni fáa sína útbúgving, greiðir hon frá.

## Kærleiki

Eftir trý góð ár sum húshjálp fekk Sammy arbeiði í eini matstovu, sum ein amerikanari átti. Tað var eisini hann, ið gav henni tað meiri vesturlendska navn sítt.

**Fyribils trívist eg her við Gjógv. Her er fínt at búgva, ja, er besta stað á jørð – enn, í hvussu so er**

Hann dámdi væl Sammy, og tá hann lat upp eina barr á øðrum staði, bjóðaði hann henni arbeiði her – eitt arbeiði, sum eisini gav henni betri løn.

– Hann tosaði bæði enskt og kinesiskt, tí hann hevði búð, bæði á Taiwan og í Kina í eini 10 ár. Eg dugdi tó bara kinesiskt, og ikki eitt einasta orð á enskum, men tað lærdi eg nú so líðandi, sigur hon.

Millum ár og dag komu nógv fólk inn á barrina, millum nakrir ið presenteraðu henni fyri einum føroyingi við navninum Harry Toftum. Hann arbeiddi á landi hjá Mærsk-fyritøkuni, og kom nú helst oftari og oftari á vitjan á arbeiðsplássi hennara.

Sammy var tó greið yvir, at millum fólkið í býnum var ein ávís mistrúgv til fremmandafólkið, helst tí at tey so ofta vóru snýtt av teimum. Men við Harry var øðrvísi.

– Innast inni hugsaði eg við mær sjálvari, at eg skuldi so ongatíð fara at fáa mær ein fremmandan drong. Men eg veit ikki, – eg og Harry gjørdust kortini so líðandi vinir og par, sigur Sammy við einum brosi. —That happens!

## Heppin við Harry

Liðin eru longu fýra ár síðani hetta hendi. Nógv er broytt hesi árini, men kortini ikki hugsanin um hennara Harry.

Harry var – og er – eftir hennara tykki ein sera fittur og góður maður. At byrja við sóust tey so at siga bert um vikuskiftini, orsakað av arbeiðum sínum:

Hon arbeiddi fyri tað mesta um náttina og hann um dagin, men hetta forðaði kortini ikki vinarlagi teirra at vaksa meir og meir, soleiðis at tey at enda gjørdust par.

– Eg hoyrdi aðrar gentur fortelja frá, at ikki allir menninir høvdu so góðar ætlanir. Teir steðgaðu stutt og vóru so brádliga farnir avstað aftur, uttan at siga eitt einasta orð.

– Men eg haldi, at eg var heppin at møta júst Harry. Hann arbeiddi her og búði her, so tað var øðrvísi við honum, sigur Sammy.

Nú fekk eisini møguleika at fara út úr heimlandinum og uppliva aðrar mentanir, onnur lond, ókendar oyggjar í Norðuratlantshavi. Og eina av norðastu bygdum okkara, ta náttúruvøkru bygdina Gjógv.

– Her er gott at vera.

*snorri@sosialurin.fo*

## 1 munur

**Fyri trimum árum síðani setti Sammy á fyrsta sinni fót sín á føroyska jørð. Tað hevur gjørt síðani, og hevur nú búð her í fleiri mánaðir.**

**Hon kemur úr einum býi við omanfyri 7 mió íbúgvar og býr nú í eini bygd við einans 40 fólkum.**

**– Jú, tað er sjálvandi munur á støddini á Dong Guang og Gjógv. Tað er tað hóast alt, men eg haldi kortini, at tann størsti munurin er kvaliteturin hjá fólki. Her eru øll fitt og blíð. Her er trygt at vera, og eg merki einki til misálit millum fólk.**

**– Tað er líkasum at fólk her eru meiri eins enn tey eru í Kina. Øll hava nóg mikið, og eingin orsøk er at øvunda hinum. Fólk tykjast heldur hjálpa hvørjum øðrum, slær Sammy Zhang fast.**

**Eg hevði faktiskt einki annað væl enn at gevast, hóast eg elskaði at ganga í skúla. Tey bæði eldru fóru í hægri skúla, og so máttu foreldrini sjálvandi gjalda meiri fyri tað**